# Atlantsmótið er í bíðistøðu

**Talið á føroyskum luttakarum á oljumessuni í Aberdeen er ikki í nánd av tí, sum tað plagdi at vera**

OLJUMESSA
*Jan Müller*

Sosialurin, Aberdeen: Avmarkaða føroyska luttøkan á altjóða oljumessuni í Aberdeen í hesum døgum er helst ein góð og sigandi mynd av tí støðu, sum alt Atlantsmótið – tað er føroyski landgrunnurin og økið vestanfyri Hetland – eru í.

Fara vit umleið 10 ár aftur í tíðina, vóru ikki færri enn 90 føroyingar við tveimum landsstýrismonnum á odda á oljumessuni í Aberdeen.

Nú vit skriva 2003, er talið niðanfyri 20.

Føroyar luttaka við einum bási, har ellivu fyritøkur eru umboðaðar.

## Bíðistøða

Ein av kendastu oljujournalistunum í Skotlandi, Jeremy Cresswell, hevur fylgt oljugongdini í Norðsjónum og vestanfyri Hetland seinastu 25 árini:

– Atlantshavið er í eini bíðistøðu í løtuni. Her hendir ikki so nógv, og vit vita heldur ikki, hvussu framtíðin fer at síggja út, sigur hann.

Hvat føroyska økinum viðvíkir, so heldur Cresswell, at vit mugu brynja okkum við toli.

– Fýra brunnar eru einki. Átta brunnur eru heldur ikki so nógv. Tað er ikki fyrr enn, tað eru boraðir eini 20 brunnar, at tað veruliga verður áhugavert. Soleiðis hevur tað verið so nógva aðrastaðni.

Jeremy Cresswell heldur tað annars vera spell og eitt sindur løgið, at vit hoyra so lítið frá Amerada Hess um Marjun-fundið.

– Er tað ikki upp á tíðina, at Hess spælir út við, hvat tey ætla í sambandi við Marjun-fundið, spyr skotski oljujournalisturin.

## Elttør er við

Oljumessan setir serliga kikaran á Norðsjógvin og royndirnar at fáa hendur á tí »síðstu« oljuni í verandi keldum.

Í gjár vitjaði borgarstjóri í Aberdeen føroyska básin. Seinni í ár kemur stór sendinevnd úr Aberdeen til Føroya á vitjan.

Millum føroyingarnar í Aberdeen er eisini Eyðun Elttør, landsstýrismaður við oljumálum.

# Jazzur í kjallaranum

**Havnar Jazzfelag vaknar nú úr dvala og fer í næstum at skipa fyri regluligum tónleikaframførslum á Vertshúsinum í Havn**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*



*Déjá Vu fer at spæla á Versthúsinum seinni í hesum mánaðinum*

Havnar Jazzfelag var stovnað í 1975 við tí endamáli at skipa fyri konsertum við jazzi og øðrum rútmiskum tónleiki. Í fleiri ár var felagið eitt tað virknasta í landinum og stóð fyri óteljandi jazztiltøkum í Havn – millum annað í gomlu B36 húsunum í Gundadali, Veitsluhøllini í Havnar Klubba og Perluni, meðan hon enn stóð.

Í longri tíð hevur felagið ikki havt fast høli tøkt at hýsa tiltøkum í, men nú eru betri tíðir í eygsjón.

## Vertshúsið pallur

Restorffs Bryggjarí, sum eigur nýupplætna Vertshúsið ovarliga í Niels Finsens gøtu, hevur innrættað høli í kjallaranum, sum er sera væl skikkað til jazz og onnur tiltøk við rútmiskum tónleiki.

Eftir áheitan frá eigarunum fer Havnar Jazzfelag at skipa fyri jazztónleikahaldi í Vertshúskjallaranum komandi vetur.

Fyribils verða tiltøkini hvørt leygarkvøld. Atgongugjaldið verður fyri fyrst 60 kr. Fyri limir í Havnar Jazzfelag og limir í samtakinum Grót verður atgongugjaldið tó bert 40 kr.

## September

Lagt verður fyri leygarkvøldið 6. september, tá ið Søren Søgaard fer at spæla. Hann spælir bluestónleik.

Leygarkvøldið 13. september verður limafundur klokkan 21.00. Frá kl. 23.00 fara Hans Petur í Brekkunum, Arnold Ludvig og Rógvi á Rógvu at spæla.

Déjá Vu fer at spæla 20. september og Spælimenninir 27. september.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum, sum vístu samkenslu,
tá góða mamma, vermamma, omma, langomma
og olduromma okkara,

**Trinemia Sigurðsson**

doyði og varð jarðað.
Tøkk til talarar, berarar og gravara.
Tøkk fyri blómur og kransar og fyri peningagávur
til sambýlið á Heygnum.
Tøkk til øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til.
Tøkk til øll, ið vóru um hana í sambýlinum
á Bøgøtu og sambýlinum á Heygnum.
Tøkk øll, ið fylgdu henni
til hennara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Børnini**

# Hóvligur vøkstur í flogferðsluni



Talið á fólkum, sum ferðast um flogvøllin í Vágum, økist framvegis.

Tølini fyri august mánað vísa, at 21.106 fólk fóru um flogvøllin, og tað er ein vøkstur upp á 3,7 prosent samanborið við sama mánað í fjør.

Higartil í ár eru 118.757 fólk farin og komin um flogvøllin í Vágum afturímóti 110.818 sama tíðarskeið í fjør. Hetta er ein vøkstur upp á 3,6 prosent.

Vøksturin á ferðafólkatalinum sæst aftur á øllum rutunum.

Í august komu og fóru 567 flogfør, og hetta talið er eisini hægri enn í fjør, tá ið 524 lendu ella lættu.

Higartil í ár hava 3.669 flogfør brúkt flogvøllin í Vágum, og tað er 2,3 prosent fleiri enn somu tíð í fjør.



# Opið fyri prískríggi á Føroyarutuni

**- Vit viðgera prísásetingar á Føroyarutuni ógvuliga liberalt og eru glað fyri prískapping, sigur fulltrúi á danska ferðslumálaráðnum, sum skal góðkenna allar ætlaðar prísbroytingar á Føroyarutuni. Men prísirnir hjá flogfeløgunum báðum eru púra eins, og sambært Atlantic Airways stjóranum, fer hetta eisini at vera støðan framyvir.**

LUFTKAPPING
*Rúnar Reistrup*

Hóast tvey flogfeløg kappast um ferðafólkini á sonevndu Føroyarutuni millum Danmark og Føroyar, so er prísir teirra púra eins. Leingi hava bæði flogfeløgini havt hug at burturforklára hesa støðu við at allir prísir skulu góðkennast av danska ferðslumálaráðnum, og at hetta hevur avmarkað príspolitikkin.

Men hendan undanførslan heldur ikki longur, tí á danska ferðslumálaráðnum siga tey seg nú hava sagt ja og amen til øll ynski um príslækkingar, sum nakrantíð eru komin frá flogfeløgunum á Føroyarutuni.

– Eg kann ikki minnast at vit nakrantíð í nýggjari tíð hava noktað einum ynski um prísbroytingar frá flogfeløgunum á Føroyarutuni. Í fýrsunum kom tað fyri, at vit noktaðu ætlaðum prísshækkingum, men ikki príslækkingum, sigur Thorkild Saxe, fulltrúi á loftferðsludeildini hjá danska ferðslumálaráðnum ígjøgnum nógv ár.

## Liberal linja

Danski staturin hevur einkarrætt at reka loftferðslu millum Danmark og Føroyar, men kann veita rakstrarloyvir at flúgva á rutuni til flogfeløg. Ein av treytunum fyri hesum rakstrarloyvum er, at allir prísir skulu góðkennast av danska ferðslumálaráðnum.

Ferðslumálaráðið sendir allar umsóknir til hoyringar hjá Landsstýrinum, men bindur seg ikki til at taka svarið til eftirtektar. Tað valdi ferðslumálaráðið til dømis ikki at gera, tá Landsstýrið fyri nøkrum árum síðan mælti frá at loyva Maersk Air at selja ferðaseðlar fyri serliga lágar tilboðsprísir í hásesongini. Danska ferðslumálaráðið góðkendi ætlaðu príslækkingina, og tað elvdi til ónøgd nøgvastaðni, millum annað á Fólkatingi, har annað av føroysku umboðunum, Óli Breckman, legði harðliga eftir táverandi ferðslumálaráðharranum, Jacob Buksti.

Men danska ferðslumálaráðið stóð fast við liberalu linjuna í prísásetingini, og hon er, um nakað, vorðin enn meira liberal síðan.

– Vit hava ongan áhuga í at avmarka kappingina hjá feløgunum ella á nakran hátt forða teimum í at koma við góðum tilboðum. Vit viðgera prísásetingar á Føroyarutuni ógvuliga liberalt og sum útgangsstøði eru vit glað fyri prískapping, sigur Thorkild Saxe, fulltrúi.

## Eingin minstiprísur

Hvussu ógvusligar príslækkingar ferðslumálaráðið er til reiðar at góðtaka, dugir Thorkild Saxe ikki at siga neyvt, tí tað veldst um hvussu prísirnir eru samanskrúvaðir. Men sambært fulltrúanum hevur ferðslumálaráðið einki ímóti at eitt ella bæði feløg fara heilt langt niður í prísi.

– Eg vil ikki svara uppá, hvat vit høvdu sagt, um ferðaseðlarnir knappliga vórðu seldir fyri eina krónu, men grundleggjandi hava vit einki ímóti stórum príslækkingum. Tað má gjarna vera bíligt at flúgva millum Føroyar og Danmark, og tað má gjarna vera hørð kapping millum flogfeløgini. Tað meta vit eisini at føroyska Landsstýrið eftirhondini heldur.

## Verjir ikki tann veikara

Bæði Atlantic Airways, og eigari tess, Føroya Landsstýri, hava ofta ført fram, at kappingarneytin á Føroyarutuni er so sterkur peningaliga, at hann uttan trupulleikar kann køva føroyska felagið í einum prískríggi, fær hann høvi til tað. Men hetta høvi hevur Maersk Air eftir øllum at døma longu, tí danska ferðslumálaráðið tekur ikki fyrilit fyri hvat av flogfeløgunum á Føroyarutuni er sterkari enn hitt.

– Tað er ikki á tann hátt vit meta um umsóknirnar frá flogfeløgunum. Vit hava einki grundarlag fyri at meta um hvat flogfelag er peningasterkari enn hitt, tí vit hava einki innlit í hvat hvørt flogfelag forvinnur á Føroyarutuni. Tað er sjálvir prísirnir og treytirnar fyri teimum, sum vit hyggja eftir, tá vit meta um umsóknirnar, ikki hvør hevur flest pengar ella størstan marknaðarpart, sigur Thorkild Saxe.

## Soleiðis er kapping

Men hóast danska ferðslumálaráðið soleiðis er til reiðar at góðkenna nærum allar príslækkingar, bara tær verða framdar undir rímiligum treytum, so er tað ein sannroynd, at prísirnir á ferðaseðlunum millum Danmark og Føroyar eru teir somu, uttan mun til hvørjum felag tú flýgur við.

Í Sosialinum herfyri segði kunningarleiðarin hjá Maersk Air, Per Brinch, at tað var í øllum førum ikki Maersk Air, sum setti sínar prísir eftir prísunum hjá Atlantic Airways.

Sambært stjóranum fyri Atlantic Airways, er orsøkin til meinlíku prísirnar júst tann, at kapping er millum flogfeløgini.

– Sakin er tann, at um Maersk Air fremur eina príslækking, so noyðast vit at matcha teirra prís, annars missa vit kundar. Og um vit lækka prísin, so noyðist Maersk Air at lækka prísin tilsvarandi, annars missa teir kundar. Tí eru prísirnir eins. Soleiðis er kapping. Tað er ein romantisering av kappingini at halda, at hon førir til at tveir veitarar kunnu selja somu vøru til ymiskar prísir, sigur Magni Arge, sum er troyttur av at hoyra talan um prísavtalur millum flogfeløgini bæði.

## Føroyarutan bílig

Atlantic Airways stjórin heldur fast við, at prísurin fyri ein fult fleksiblan ferðaseðil á Føroyarutuni er bíligur samanborið við aðrar líknandi rutur í okkara parti av heiminum. Orsøkin er, sambært Magna Arge, áhaldandi kappingin millum Atlantic Airways og Maersk.

– Tað er neyðugt at síggja kappingina í einum longri høpi heldur enn bara her og nú. Tað er prískapping á Føroyarutuni, og hon hevur verið orsøkin til at prísurin á fult fleksiblu ferðaseðlunum ikki er hækkaður í nærtil sama mun á Føroyarutuni sum á øðrum líknandi rutum seinastu tíggju árini, sigur Magni Arge.

Tað er púra vanligt í restini av Europa, at kappingin millum flogfeløgini ikki beinleiðis sæst aftur á teimum dýru fleksiblu ferðaseðlunum. Men hinvegin ber til at flúgva Europa á tamb fyri lítið og lætt við at gera sær dælt av serligum tilboðum, ið hava til endamáls at fylla tómu setrini í hálvtómum flogførum. Líknandi tilboð eru ikki at finna á Føroyarutuni, hóast nógv flogfør fara hálvtóm avstað í lágsesong.

Sambært Magna Arge, stjóra fyri Atlantic Airways, ber ikki til at selja tómu setrini fyri ein lítlan penga, nettup tí at prísurin fyri fult fleksiblar ferðaseðlar er so lágur frammanundan.





